**Ógilda rokning**

Rokningar, sum eru bókaðar og leysgivnar, men kortini ikki skulu verða goldnar, kunnu verða ógildaðar í FSL-kreditor so leingi, sum upphæddin ikki er farin víðari til útgjaldsskipanina. Um teigurin "Amount Paid" vísir null fyri eina ávísa rokning, so er upphæddin ikki farin til útgjaldsskipanina. Allar rokningar, sum ikki eru leysgivnar, kunnu verða ógildaðar.

Er ein rokning ógildað, kann hetta ikki seinni verða broytt, so at upphæddin kortini verður útgoldin. Í slíkum føri er neyðugt at bóka rokningina umaftur.



*Mynd: "Navigator"*

- **Rokningar** => **Skráset**.



*Mynd: "Invoice Batches"*

- Trýst á [**F11**] (Fyrispyr).
- Innset **bektnavn** í teigin "**Batch Name**".
- Trýst á [**Ctrl+F11**] (Svara fyrispurningi).
- Trýst á knøttin "**Invoices**".



*Mynd: "Invoices"*

- Flyt markørin til rokningina sum skal ógildast.

Um teigurin "Amount Paid" vísir 0,00, kann rokningin verða ógildað.

- Trýst á knøttin "**Actions...1**".



*Mynd: "Invoice Actions"*

- Marka teigin "**Cancel Invoices**".
- Trýst á "**OK**".



*Mynd: "Caution"*

Skipanin spyr um ein rokning skal verða ógildað.

- Trýst á "**OK**".

Um vit hava valt eina rokning, har upphæddin er farin víðari til útgjaldsskipanina, kann útgjaldið ikki verða annulerað í kreditorskipanini. Henda fráboðan kemur tá á skíggjan: "This Invoice has an effective payment".

Í vindeyganum "Invoices" sæst nú at upphæddin fyri rokningina er sett til null. Teigurin "Status" vísir nú "Cancelled", ógildað. Teigurin fyri konteringar "Distribution Total" vísir eisini null.



*Mynd: "Invoices"*

- Trýst á "**Distributions**".

Í konteringsvindeyganum "Distributions" síggja vit at ein bókingarlinja er gjørd afturat, har upphæddin er ein minusupphædd, og konteringin er tann sama, sum fyri upprunalinjuna.

Teigurin "Status" sigur at konteringarnar eru leysgivnar, "Approved". Í teiginum "Accounted" stendur "No", sum sigur at upphæddirnar ikki eru førdar yvir til høvuðsbókhaldsskipanina. Tá ein rokning verður ógildað, verða eingi tøl í samb. við rokningina yvirførd til høvuðsbókhaldsskipanina.




*Mynd: "Distributions"*

Fyri at koma aftur til høvuðsvalmyndina verður trýst á [F4].